Galdandi ásetingar fyri øki H:

Øki H:

a) Økið H er tað sum eftir er av kommununi tá ið frammanundan nevndu økini eru tikin frá og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.
b) Loyvt er bert at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í pkt. a). Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband.
c) Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

Ein partur av økinum (sí viðløgd kortskjøl) verður broyttur til øki K við fylgjandi ásetingum:

Øki K:

a) Økið verður lagt til vindmyllulund, og aðrar orkuframleiðslubyggingar.
b) Orkuframleiðslubyggingarnar kunnu bert fremjast eftir góðkendari ætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki.
c) Loyvi kann gevast at byggja vegir, hús, skýli ella aðra tekniska útgerð, ið krevst til raksturin av eini frammanundan góðkendari orkuframleiðslubygging.

   Tílíkar byggingar ið náttúrliga hoyra til slíkar orkuframleiðsluútbyggingar, skulu tillagast landslagi og lendi soleiðis, at teir í minst møguligan mun lýta náttúrliga landslagi í økinum.
d) Nærri ásetingar fyri K-økini kunnu verða gjørdar í serstakari byggisamtykt.